# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 3. juni 2020
Mál nr.: 20/00199-2
Málsviðgjørt: JHT/KM
Eftirkannað:

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**tíðaravmarkaða veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2020**

Við heimild í § 22, stk. 2, § 34, stk. 1, nr. 1 og 3, stk. 2, nr. 2 og 5 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi verður ásett:

**§ 1.** Eftir umsókn og við fiskiloyvi frá Vørn er loyvt teimum, sum hava rætt til fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6 í løgtingslógini, at royna við snellu, snøri ella tráðu á Føroyabanka.
*Stk. 2.* Bátar við fiskiloyvi sambært stk. 1 kunnu fiska innan fyri eitt samlað dagatal upp á 50 fiskidagar. Fiskiskapurin skal steðga, tá hesir dagar eru brúktir.

**§ 2.** Eftir umsókn og við fiskiloyvi frá Vørn er loyvt teimum, sum hava rætt til fiskiloyvi í bólki 4 A og bólki 4 B, sambært § 19, stk. 1, nr. 3 og 4 í løgtingslógini, at royna við snellu, snøri ella tráðu á Føroyabanka innan fyri linjur drignar millum hesi støð:
1) 60°50,000'N 07°57,000'V
2) 60°57,333'N 07°57,000'V
3) 60°45,667'N 08°37,000'V
4) 60°36,500'N 08°45,000'V
5) 60°26,000'N 09°08,417'V
6) 60°24,000'N 09°07,000'V
7) 60°50,000'N 07°57,000'V
*Stk. 2.* Bátar við fiskiloyvi sambært stk. 1 kunnu fiska innan fyri eitt samlað dagatal upp á 30 fiskidagar. Fiskiskapurin skal steðga, tá hesir dagar eru brúktir.

**§ 3.** Fyri bátar við fiskiloyvi sambært § 1 telur hvør túrur ein fiskidag, sambært § 2, nr. 10 í løgtingslógini, hóast túrurin er meira enn 24 tímar.

**§ 4.** Skipari ella formaður á báti við fiskiloyvi sambært §§ 1 og 2, sum fer á Føroyabanka, skal boða Vørn frá á telefon +298 316913, tá farið verður úr havn, og tá komið er aftur í havn.

**§ 5.** Bátur við fiskiloyvi sambært § 1, sum á sama túri roynir aðrastaðni enn á Føroyabanka, skal, tá ið avreitt verður, tilskila, hvussu nógv av veiðuni er fingin á Føroyabanka, flokkað eftir fiskasløgum.

**§ 6.** Bátar við fiskiloyvi sambært § 1 skulu hava fylgisveinaútgerð umborð, sum er góðkend av Vørn, og sum til einhvørja tíð

kann upplýsa um knattstøðuna hjá bátinum. Farið verður fram eftir somu mannagongd og treytum, sum ásett í kunngerð um eftirlit við fiskiførum um fylgisvein.

**§ 7.** Brot á §§ 4-6 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 3.* Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. august 2020.

Fiskimálaráðið, xx. juni 2020

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert